# KN tag
## Det bedste over hovedet...
### - også på Færøerne

- Tagpapdækning
- Efterisolering med Rockwool
- Tagrenoveringer
- Tagreparationer
- Renovering af skiffertage

**Op til 15 års garanti**

Medlem af DTBs Garantifond

KN Tagdækning A/S

www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk

Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
**Tlf.** 0045 **97 86 17 33** •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
**Tlf.** 0045 **97 40 19 33**
Industrivej 15 • 7700 Thisted
**Tlf.** 0045 **97 92 61 33**
Ring og få et godt tilbud.

**Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli**



# Stóra bringu
## -ella lítla?

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-støðd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína støðd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Sosialurin - 311820

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

# Vikuskiftisskeið í autismu

Evni:
1. Hvat hendir tá ið autisma verður staðfest hjá einum barni?
2. At liva lívið við einum brekaðum barni.
3. Uppfatanin av autismu sum brek, samstarvið við foreldrini og avbjóðingarnar fyri starvsfólkið.

Undirvísarar verða:
* Lis Jepsen, serlærari innan autistiska økið.
* Lisbeth Hovman, sálarfrøðingur.
* Báðar arbeiða tær sum pedagogiskir/psykologiskir vegleiðarar í Århus Amt.

Dagar: 26. & 27. august 2000, báðar dagar frá kl. 09.00 til kl. 16.00.
Stað: MBF-húsið, Íslandsvegur 10, 100 Tórshavn
Tilmelding: Maria Lindberg, tlf. 455213
Óluva Vilhelmsen, tlf. 319629

Freist: 18. august 2000
Kostnaður: kr. 700,00
Málbólkur: Foreldur hjá autistiskum børnum 0–18 ár.
Starvsfólk, ið arbeiða við autistiskum børnum.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Avloysari til skrivstovustarv

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir einum fólki til skrivstovuna sum avloysari fyri skrivstovufólk í farloyvi.

Arbeiðið fevnir um skrivstovuhald, skrivaraarbeiðið, avgreiðslu og samskiftið við limir og viðskiftafólk.

Tað er ein fyrimunur um tú:
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- dugur at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir
- dugur væl at samskifta á føroyskum
- hevur telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Løn eftir avtalu. Starvssetnanin byrjar umleið hálvan august 2000 og varir væntandi til 31. desember 2000.

Skrivlig umsókn, merkt »Skrivstovustarv«, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. juli 2000. Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen ella Bjørgfríð Ludvig á tlf. 311864.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Vinnuhúsið, Postsmoga 179
110 Tórshavn

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 11 vinnufeløgum, og í løtuni starvast 5 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum

# Timburmenn/ forskallarar

Søkt verður eftir timburmonnum og forskallarum til støðugt arbeiði.

**P/F Guttesen & Staksberg**
Tlf. 313495

**Toll- og Skattstova Føroya Streymoyar øki**

# Summarfrí

Vegna summarfrí frá og við 17. juli til og við 4. august 2000 verður avgreiðslan Smyrilsvegur 7 bert opin frá kl. 11.00 til kl. 13.00 nevnda tíðarskeið.

Tollbúðin/avgreiðslan og posttollurin hava opið sum vanligt, eins og telefonin til teirra svarar.

**Toll- og Skattstova Føroya Streymoyar Øki**

KPMG

# Skrivstovuhøli til leigu

Fyrstafloks skrivstovuhøli í miðbýnum í Tórshavn eru til leigu. Hølini eru útgjørd við ventilatión og øllum nútímans tekniskum installatiónum.

Talan er um upp til 530 etagumetrar, sum kunnu býtast upp í 3 leigumál av ymiskari støðd. Hertil koma felagshøli, kantina, fundar- og undirvísingarrúm v.m.

Hølini eru klár at taka í nýtslu og verða leigað út skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Beintu Jensen á tel 34 34 34.

team 85 • 31 65 11

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn,
Tel 34 34 34, Fax 34 34 35

# Læknaskrivaraavloysarar

**Søkt verður eftir avloysarum fyri læknaskrivararnar hjá:**

**Jaspuri Petersen:**
Talan er um tíðarskeiðið 31/7–8/9, tá *Marianne Ekberg* kommunulækni úr Svøríki avloysir Jaspur.

**Magnusi Magnussen:**
Talan er um tíðarskeiðið 1/8–27/8, tá *Jørgen Rye* kommunulækni úr Danmark avloysir Magnus.

Hava hesi størv tín áhuga, so ring ella skriva til:

**Jaspur Petersen, kommunulækna, Klaksvíksvegur, 700 Klaksvík, tlf. 456400.**

ella

**Magnus Magnussen, kommunulækna, Klaksvíksvegur, 700 Klaksvík, tlf. 455451.**

**Klaksvíkar Býráð**

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður Kommunuskrivstovan stongd í tíðini frá mánadegnum 17. juli til mikudagin 9. august 2000

**Skála Kommuna**



# máling & gólv
## SUMMAR TILBOÐ

**Stormshield 1. floks betongmáling 10 ltr.**
BERT 499,-

**Johnstone's træverja timbershield 5 ltr.**
BERT 399,-

**Reyð rustverjandi takmáling 5 ltr.**
BERT 299,-

# máling & gólv

Við Landavegin • Tórshavn
Tel. 31 60 66

Original bosal Útstoyt



ES

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjør›ur**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

# Sløkki- og neyðútgerð

- Brannslangir
- Slanguvognar
- Eldsløkkjarar
- Brannteppir
- Forbindsskáp
- Børir

***Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.***

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
**Stongt vegna summarferiu til 21. aug.**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 106 1.5 XND Diesel
**Árg.:** 1995
**KM:** 87.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá P/f Meinhardt Arge.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Fróði Müller
tlf. 345600 · lokal 728
Fartlf. 283892
at hitta millum kl. 13 og 15

# Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
E-mai: advfelag@post.olivant.fo
Telefontíð: $9^{30} – 12^{00}$ og $13^{00} – 16^{00}$

| | |
|---|---|
| Tórmóður Djurhuus, adv. | Dánjal Magnussen,adv. |
| Jógvan Páll Lassen, adv. | Petur Even Djurhuus, adv. |
| Jógvan E. Ellefsen, adv. | Anna Dam, adv. |

Ingi Højgaard, adv.

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegnum 17. juli 2000.

Opið verður aftur mánadagin 31. juli 2000.

**Advokatfelagið Yviri við Strond 4**

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

*Lýsið í* **sosialinum**

GOYMSLUSTÝRING • ÚTKOYRING AV VØRUM • KUNDATÆNASTA

# Goymslumaður til Elding í SMS

Vit sóknast eftir einum goymslumanni til Elding í SMS at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávur**
Vit vilja bjóða tær eitt spennandi starv í einum umhvørvi í støðugari menning. Tú kemur m.a. at taka tær av goymslustýring, útkoyring av vørum og aðrar fyrifallandi arbeiðsuppgávur sum t.d. kundaavgreiðsla.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt avbjóðandi og spennandi framtíðarstarv. Eisini verður møguleiki at luttaka á ymiskum skeiðum.

**Vit vænta**
- at tú er ágrýtin og røkin
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú er álítandi og fyrikomandi
- at tú hevur teldukunnleika
- at tú hevur koyrikort

Løn sambært nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú senda eina skrivliga umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum til okkara innan 17. juli 2000.

Um tú hevur spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Símin Hansen, tel 31 96 97.

ELDING
**SMS • Postboks 1289 • 110 Tórshavn • Tel 319697**

**Undirvísingar- og mentamálstýrið**
# Stuðulsstovnurin

## Málsviðgeri/skrivari

***Starvið***
Á Stuðulsstovninum er eitt áhugavert starv sum málsviðgeri, skrivari, journalleiðari v.m. leyst at søkja.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a.:
- Málsviðgerð
- Skrivari hjá leiðara
- Uppræettan og røkt av nýggjari journalskipan
- Røkt av heimasíðu
- Kæruumsiting
- Vanligar skrivstovuuppgávur

***Førleikakrøv***
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarin hava
- Skrivstovuútbúgving og HH/student ella líknandi
- Royndir innan økini, ið verða nevnd undir høvuðsuppgávunum
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

***Vit bjóða:***
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning
- Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í 15. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Stuðulsstovnin
Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. juli 2000 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á Stuðulstovninum, á telefon 31 96 80 ella 44 47 39.

*Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Undirvísingar- og Mentamálastýrinum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar.*
*Á **Stuðulsstovninum** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.300 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 4.000 persónum. Stuðulsstovurin hevur í 2000 eina útreiðslujáttan uppá 1,9 mió. kr., og veitt uml. 54,2 mió. kr. í lestrarstuðli.*